Trafikkproppur í Steinatúni:

# Kloakkirnar verða umlagdar

**– Vit eru vitandi um, at kloakkarbeiðið fer at órógva ferðsluna í Steinatúni og miðbýarlívið sum heild. Men tað fer at bøta munandi um óhumskuna á vágunum, sigur Tórshavnar Kommuna**

VEGARBEIÐI
*eydna@sosialurin.fo*

Mánadagin fóru kommunumenninir undir fyrsta partin av stóra kloakkarbeiðnum, sum nú verður gjørt í Havnini. Ætlanin er at leggja eina nýggja høvuðskloakk frá lokinum yvir Havnará eftir Steinatúni og J. Paturssonargøtu, heilt út á Frælsið



*Orsakað av stóra holinum í vegunum, varð øll ferðsla stongd í miðbýnum frá 09-12 týsdagin. Ferðslupropparnir merktust um allan býin av tí sama. Framyvir verður ferðsla loyvd, men bert annan vegin, nevniliga frá Bøkjarabrekku og móti Jóannesar Paturssonargøtu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ferðslan darvað

Seint mánakvøldið varð Steinatún stongt fyri allari ferðslu, meðan ein stór maskina gróv eitt petti av aðrari vegbreytini upp.

Kommunan sigur, at orsøkin til, at vegurin varð stongdur, er hon, at har er ein vatnleidningur, ið má ansast eftir sum reyðagull.

Týsmorgunin frá 07-09 var gjøgnumkoyring aftur loyvd, men koyrandi var bert eftir aðrari breytini, og trafikkpropparnir merktust langt út um miðbýin, tí ferðslan gekk so mikið seint.

Arbeiðið, at leggja nýggja kloakk, er sera umfatandi og tað gerst ikki uttan at ferðslan verður darvað og miðbýarlívið órógvað. Men fyri ikki at órógva ov nógv, hevur kommunan valt at býta hetta arbeiðsstigið upp í fleiri partar. Fyrsti parturin av hesum arbeiði, sum nú er byrjað, er frá lokinum yvir Havnará til Tróndargøtu, og tað er mett at taka uml. 8 vikur. So í 8 vikur mugu bilførarar, sum hava skund, velja eina aðra leið enn Steinatún. Hetta tíðarskeiðið verður nevniliga bert koyrandi frá Bøkjarabrekku til Jóannesar Paturssonargøtu, bilar, ið koma hinvegin, mugu koyra oman eftir Tórsgøtu.

Hetta tíðarskeiðið verður bert loyvt býarbussunum og persónbilum at koyra ígjøgnum Steinatún.

Fyri at fáa arbeiðið at ganga so skjótt sum gjørligt, og at tryggja arbeiðsfólkinum á staðnum, hevur kommunan somuleiðis avgjørt at banna tungari ferðslu í J. Paturssonargøtu, Steinatúni og Bøkjarabrekku á strekkinum millum Dalavegin og R.C. Effersøesgøtu. Bygdaleiðir og bilar yvir 3,5 tons mugu sostatt finna aðrar farleiðir

### Umleggja kloakkina

Orsøkin til stóra og umfatandi vegarbeiðið er, at kloakkirnar í býnum mugu umleggjast.

– Tær stinkandi kloakkleivdirnar fram við bátabrúgvunum í Vágsbotni, Lítluvík og úti í Rættará er ikki nakað, sum vit kunnu liva við longur. Sum landsins størsta kommuna hevur Tórshavnar kommuna serliga ábyrgd at ganga undan á umhvørvisøkinum, sigur kommunan í tíðindaskrivi.

Vágirnar í býnum hava leingi trongt harðliga til eina reinsandi hond. Kloakkvatnið, sum leingi hevur runnið beint út ímillum bátarnar, hevur fingið fólk – og serliga ferðafólk, at ógvast. Men nú verður endiliga nakað gjørt við trupulleikan.

Fyrsta stigið varð tikið í fjør, tá farið var undir kloakkarbeiðið í Vágsbotni og í Mylnugøtu. Og nú er kommunan so farin undir annað stigið, sum verður tikið í smáum bitum.

– Tá alt arbeiðið er liðugt hava vit eina nýggja kloakk úr Bøkjarabrekku og út á Frælsi, sum so allar kloakkir omanfyri Jóannesar Paturssonargøtu verða beindar í. Men tað arbeiðið verður ikki gjørt í ár, tí tað hevði oyðilagt býarlívið at stongt miðbýin so leingi, sigur Bogi Haraldsson á teknisku deild.

– Vit eru vitandi um trupulleikarnar av at órógva ferðsluna og miðbýarlívið. Men tað er neyðugt at gera ábøturnar á kloakkskipanina í býnum – til fyrimunar fyri umhvørvið, fólksins trivna, umdømi býarinnar bæði burturi og heima og ferðavinnuna, sigur hann. Stóð tað upp til verkfrøðingarnar, varð alt økið stongt allatíðina, meðan arbeiðið varð framt. Tað ber tó ikki til, og tí verður ferðslan bert tarnað, sigur hann.

# Høgligari at koma í Müllers Pakkhús

**Fyri at bøta um viðurskiftini at koma í Müllers Pakkhús, hevur Tórshavnar kommuna gjørt eina ætlan fyri, hvussu Lágakei kann knýtast til gongubreytina, ið er við bátabrúgvarnar í Vágsbotni. Arbeiðið verður liðugt miðjan juni í ár**



### Müllers Pakkhús

Hesi seinastu árini hevur Müllers Pakkhús, sum Tórshavnar kommuna nú eigur og rekur, verið karmur um nógv mentanartiltøk, m.a. samkomur, móttøkur, framløgur, tónleikatiltøk og fjølbroyttar framsýningar, t.d. sølveframsýningina Gluggaglæmu. Umframt alt hetta plagar Müllers Pakkhús eisini at verða nýtt sum framsýningarhøli á Listastevnuni.

Ein bági hevur tó verið, at tíðarinnar tonn hevur sett síni sjónligu merki í umhvørvið við Lágukei og Høgukei. Hetta ger, at tað hevur verið heldur torført og ólagaligt hjá fólki at komið av Skálatrøð í Müllers Pakkhús, serliga myrku tíðina á árinum. Har eru nevniliga eingi gøtuljós, gróttrappan upp á Høgukei er slitin og ójøvn, og fram við Skeivapakkhúsi er óslætt og tí ikki heilt vandaleyst at ganga.

Fyri at betra um hesi viðurskifti, hevur Tórshavnar kommuna gjørt eina ætlan fyri økið, sum í høvuðsheitum snýr seg um at hampa og fríðka um, og knýta saman Lágukei við verandi gongubreyt við bátabrúgvarnar í Vágsbotni.

### Brúgv og trappur

Har Rættará rennur í sjógv á Skálatrøð, verður gjørd ein træbrúgv. Nýggj trappa skal gerast upp á Høgukei, og fram við Skeivapakkhúsi verður bryggjukanturin breiðkaður, so at pláss verður fyri beinkjum, har til ber at seta seg at njóta vakra sýnið av smábátunum við brúgvarnar. Beint út fyri, við stabbarnar, fara eisini Westward Ho og Norðlýsið at liggja.

Við brúgvarendan millum Skeivapakkhús og Müllers Pakkhús verður gjørd ein trappa við høgum trinum í sjógv, og við Lágukei skal nýggjur bátadráttur við lunni gerast.

Somuleiðis verður alt økið steinsett av nýggjum. Rekkverk verður gjørt fram við trappum og bryggjukanti, og gøtuljós sett upp.

Sum frá líður kemur tí Müllers pakkhús og umhvørvið úti í Rættará at standa sum eitt virðiligt og prýðiligt minni um eina farna tíð.

Tað er P/f Guttesen og Staksberg sum ger arbeiðið fyri kommununa, og ætlanin er, at tað skal verða liðugt um miðjan juni í ár.

**eys**